tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Vanvirðingin av suðuroyingum

Oddagrein

GOTT sjóvegis ferðasamband er ein týðandi fortreyt hjá suðuroyingum í nærum øllum lívsins viðurskiftum. Og spurningurin um suðuroyarleiðina er eisini javnan frammi í fjølmiðlunum og á tingsins røðarapalli. Tað eru uttan iva tey, sum halda, at suðuroyingar eiga at taka til takkar við tí, sum er og teir fáa boðið. Hetta siga fólk, sum ikki kenna á egnum kroppi, hvat tað vil siga at vera ein útoyggj sammett við meginøkið. Tað eru helst eisini tey, sum halda, tá tey líta aftur í tíðina, at suðuroyingar eiga at vera glaðir um, at sambandið hóast alt er so gott. Smyril siglir jú hvønn dag. Vit teljast millum teirra, sum halda, at nettupp sjóvegis sambandið millum Suðuroynna og meginøkið eigur at fáa hægsta prioritet á samferðsluøkinum. Tað er skylda okkara sum samfelag at tryggja íbúgvunum kring landið bestu umstøður á samferðsluøkinum.

SUÐUROYINGAR eru sera ónøgdir við ta viðferð, sum eitt nú landsstýrið gevur teimum, nú Smyril skal til eftirlit kanska í hálvan annan mánað. Umboð fyri SL hava fleiri ferðir verið úti og leitað eftir avloysara, men hava ikki fingið neyðuga „uppbakningin“ frá landsins játtandi myndugleikum, tá eitt hóskandi skip er funnið. Nú nærkast tíðin, tá Smyril skal til eftirlit, og hevur SL funnið eitt skip, sum tó als ikki nøktar tørvin. Og hetta vilja suðuroyingar ikki góðtaka. Men spurningurin er bara, um teir hava nakað val. Teir hava so ongan góðan í Tinganesi. Fyrr hevur Suðuroyggin átt stuðul í Nesinum, í dag er eiðasørt. Tað er kanska heldur ikki so løgið, tá hugsað verður um, at meginparturin av landsstýrismanningini kemur úr Norðoyggjum. Herfyri tóku tingmenn seg saman til tess at fáa útoyggjum og økjunum uttan fyri meginøkið betri sømdir, men lítið sæst til, at t.d. suðuroyingar fáa nakran stuðul frá t.d. Norðoyggjum. Nettupp í Norðoyggjum sita flestu politikarar, sum stýra Føroyum í dag. Bæði løgmaður og fíggjarmálaráðharrin koma higani, og teir áttu eisini at vitað, hvat tað vil siga at búgva í útoyggj og ikki hava gott ferðasamband til meginøkið. Spurningurin er, hvussu leingi suðuroyingar vilja finna seg í at verða so lítið virdir. Hinvegin er lítið teir kunnu gera, tá stórur partur av landsstýrinum bara stendur og yppir øksl. Spurningurin er um ikki útoyggjanevndin, sum løgmaður hevur sett, eisini átti at farið við komandi avloysaranum hjá Smyrli til Suðuroyar og mett um støðuna í hesi „útoyggj“ út frá tí tænastu, sum verður latin suðuroyingum á samferðsluøkinum.

Sosialurin

Lesarabrøv:

Kaos í fullveldismálinum

Varaløgmaður heldur seg hoyra, at nú er gong komin á fullveldistokið, sum hann tekur til. Sum aðrir fjøldarvillarar er hann raskur at brúka líknilsir og myndir. Men heldur er tað luftin í fullveldisballónini, sum spakuliga futtar út í tóman heim.

Annað samráðingarumfar er av, og støðan er kritisk. Samgongan hevur ilt við at halda sama stev. Summir partar lata so smátt seyra út, at tey erkenna, at ov nógvar feilmetingar hava verið og mistøk eru gjørd. Lat okkum hugsa okkum um einaferð aftrat, ljóða spakmæltar røddir.

Samráðingarnevndin fekk kaldasveitta, tá tað gjørdist klárt (enn eina ferð), at danska stjórnin aldeilis ikki helt seg verða forpliktaða at lata blokkstuðul, hvørki í 5, 15 ella 50 ár. Vilja føroyingar loysing, so taka onnur sum givið, at teir eru til reiðar at taka fullu ábyrgdina. Men fyri at alt skal ganga skilagott fyri seg í skilnaðarstundini, so verður blokkurin trappaður niður yvir eini 3-4 ár. Hetta er stjórnartilboðið. Og hetta hevur Landsstýrið vita av líka síðani Juni-avtaluna fyri tveimum árum síðani. Tað varð ikki beinleiðis skrivað, men bleiv sagt so týðiliga, at stjórnarblaðið Aktuelt kundi referera tað frá álítandi keldu.

Men hví ikki kappa alt fyri eitt? Tjóðveldismenn og fyri ein part eisini fólkafloksmenn hava jabbað um, at blokkurin bara var skaðiligur, hann hevði spillandi árin á føroyska búskapin. Nevndir hava gjørt rapportir um “peningarenslið” millum londini og mangt annað. Óli B. hevur alment sagt tey mergjaðu orð, at “bloktilskudet kommer bare til Færøerne, for at vende på en tallerken, og siden ender det bare i danske lommer”. Eg skal ikki belæra hann og aðrar um, at pengar “enda” ongastaðni. Tað veit hann sjálvandi. Men politikkarar føla seg ofta kallaðar til at frambera slíkt svass. Allir pengar cirkulera, eisini teir sum td. Fiskasølan fær fyri at selja føroyskan fisk. Heldur ikki hesir pengar “enda” í Føroyum.

Í seinasta samráðingarumfari vóru tvey ting, sum kiksaðu fullkomiliga. (Ein misskilti støðuna og helt, at tað ljóðaði sum eitt futtfutt-tok fór í gond). Áðrenn nakað var komið burturúr samráðingunum, kravdi Landsstýrið at Danmark skuldi skriva undir uppá bindandi avtalu um samarbeiði á øllum økjum, næstan sum tað hevur verið undir Heimastýrinum. Hetta skuldi henda áðrenn nakar hevði hóming av, hvussu samráðingarnar annars fóru at enda. Hetta krav Landsstýrisins fall til jarðar. Aftur ljóðaði eitt futt, men ivi var nú millum manna. Hvønn vegin futtaði fullveldistokið?

Tað næsta sum kiksaði, ferð at koma aftur um brekkur. Alt modellið, fullveldis-konstruktiónin, fekk eitt skot fyri bógvin. Tað lak sum sáldið. Pínligar pausur komu, tá Landsstýrið ikki var ført fyri at svara og konkretisera tær leysu ordingarnar í Sáttmálauppskotinum.

Hvørjar uppgávur og skyldur skal Drottningin hava sum monarkur í tveimum suverenum fullveldum?

Skal hon eisini undirskriva løgtingslógir eins og hon undirskrivar fólkatingslógir? Vorðið sum republikanarar, sum tvíhalda um monarkiið!

Alt tos um dupultan statsborgaraskap bleiv kveistrað av borðinum. Verður tað fullveldi, so fáa tit føroyskan statsborgaraskap. Tað átti at verið øllum greitt, men varaløgmaður og hansara menn hava livað í einari fantasi-verð. Og harvið eru einir 15-20.000 føroyingar búsitandi í Danmark avskrivaðir. Og føroyskir yvirmenn í danska handilsflotanum, fara helst at velja danskan statsborgaraskap. Sagt verður farvæl til túsund møguleikar, sum føroyingar hava í dag í felagsríkinum.

Hvussu hugsa tit tykkum valutasamarbeiði? Hvørjar skyldur skulu føroyingar hava í samarbeiðinum?? - Ja, umberið okkum, tað munnu embætismenn finna útav.

Eitt tað pínligasta var, tá spurt varð hvat Landsstýrið hugsar sær, har teir í upprítinum skriva, at tá fullveldið er proklamera, so ætlar Landsstýrið at út-delegera umsitingina av fleiri málsøkjum til tað danska embætisverkið. Sama embætisverk, sum higartil undir Heimastýrislógini hevur umsitið hesi mál. Hvat er meiningin? Hvat hugsa tit? Hvør hevur ábyrgdina í seinasta enda? Hvør grundlóg er galdandi? Skula danskir embætismenn leggjast undir føroyska rættarskipan og grundlóg??

Tøgn, kaldasveitti, tannagrísl. Handalaga ljóðaði eitt stutt og fesjandi futt, tá fullveldistokið steðgaði upp og slepti dampinum. Nú var einki tryst í ketlinum.

Átta tímar vóru nú farnir. Samráðingarnevndin var útlúgvað, máttleys, vildi bert sleppa avstað og heim. Men her kom Nyrup so aftur til hjálpar. Hann lovaði, at um føroyingar velja loysing, so skal hann nokk ringja til Kofi Annan á ST-borgini, og biðja hann bestilla eina flaggstong at seta upp í Nýggju Jorvík. Nú batnaði lagið eitt sindur. Hjá varaløgmanni vaks tað frá Small til XL. Nú bar til at fara heim til oyggjarnar, og billa fólki inn, at tað er fullveldistokið, sum aftur sigur futtfutt.

Ja, og meirilutin fyri fullveldisætlanini hjá varaløgmanni og hansara harkaliði veksur í hvørjum, - í Danmark væl at merkja. Í Føroyum er gongdin tann øvugta. Illa er atborið.

Rolf Guttesen
8.5.2000

Julianneboys í Sjónleikarhúsinum

Dansitiltak við Julianneboys verður í Sjónleikarhúsinum leygarkvøldið 13 mai

Rimmar dansur verður í Havn komandi vikuskifti

Leygarkvøldið 13. mai fáa ung sum eldri høvi at uppliva góðan dansitónleik, tá Julianneboys fara á pallin í Sjónleikarhúsinum. Vit kenna flest øll teir, ið manna Julianneboys. Brøðurnir Árni, Marner og Jóan Petur Andreasen, ið byrjaðu við Black birds, hava undirhildið við melodiøsum countrylagarum síðani miðskeiðis í sjeyti-árunum.

Jóannes Jakobsen

Julianneboys fáa hjálp frá góðum kreftum hetta kvøldið, tí Jóannes Jakobsen spælir saman við teimum. Jóannes Jakobsen kenna vit frá fleiri fløguútgávum og fótbóltsævintýrum.

Tað, sum eyðkennir Julianneboys er, at teir spenna vítt innan dansitónleikin. Teirra skrá fevnir um góðan dansitónleik, ið ung sum eldri hava fragd at dansa eftir. Jóannes Jakobsen fer óivað at gera sítt til, at tað heila svingar. Tí eru allar fyritreytir til staðar til at fáa eitt rímmar dansikvøld. Harumframt verður høvi at keypa sær okkurt at leska sær við.

Tiltakið er í sambandi við, at Tórshavnar Manskór skipar fyri uttanlandsferð í summar. Dansitiltakið verður í Sjónleikarhúsinum leygarkvøldið 13 mai kl.23.00 - 03.30.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaða dóttir, systir, ommu- og abbadóttir okkara,

BIRITA MOHR,
Kollafjørður,
dóttir Naomi og Leiv Mohr,

andaðist leygardagin 6. mai 2000, 10 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Kollafjarðar kirkju mikudagin 10. mai kl. 14.00.

Familjunnar vegna
Leivur, Anna Rúna, Durita, Hildigarð, Rani og Sigrið

Seinasta gjaldførislán til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum

Nótaskipið »Christian í Grótinum« fekk tað seinasta gjaldførislánið frá landsstýrinum sambært løgtingslóg um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum og varð teimum játtað tilsamans 6 mió. kr

ÓLAVUR Í BEITI

Tað er Torbjørn Jacobsen, sum sat á tingi fyri Signar á Brúnni, sum setti fiskimálaráðharranum upp í fleiri spurningar, og hevur Jørgen Niclasen nú svarað Torbirni Jacobsen, fyrrverandi løgtingsmanni.

Torbjørn Jacobsen spyr fyrst um lán skrásett tann 27.03.1998, hvussu eitur reiðarríið og somuleiðis skipið, talan er um? Talan er um eitt gjaldførislán uppá tilsamans 6 mió. kr, sum er veitt P/F Christian í Grótinum. Talan er um nótaskipið »Christian í Grótinum«, svarar Jørgen Niclasen.

Avdráttarfrítt

Hvør er orsøkin til, at nevnda gjaldførislán varð veitt, og undir hvørjum treytum varð hetta játtað, spyr Torbjørn Jacobsen, og fiskimálaráðharrin svarar, at M/s »Christian í Grótinum« kostaði umleið 103 mió. kr. at byggja. Fígging fekst til vega frá Føroya Realkreditstovni og frá Den Norske Bank. Í hesum sambandi søkti reiðarríið eisini landsstýrið um fígging, og varð teimum játtað tilsamans 6 mió. kr. í gjaldførisláni soleiðis, at 1,5 mió. kr. vórðu goldnar í 1998, 3 mió. kr. í 1999 og 1,5 mió. kr. ár 2000. Rentan á gjaldførisláninum er í løtuni 5,5%.

– Viðvíkjandi gjaldførisláninum er annars at siga, at tað er avdráttarfrítt tey fyrstu 10 árini, og verður síðani at afturgjalda yvir 2 ár. Tað skal viðmerkjast, at hetta er seinasta gjaldførislán, sum er veitt sambært løgtingslóg um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum, sigur Jørgen Niclasen.

Skuldin 52 nió.

Viðvíkjandi spurninginum, hvussu fíggjarstøðan hjá viðkomandi lántakara var, tá ið gjaldførislánið varð veitt, svarar Jørgen Niclasen, at sambært konsernroknaskapinum hjá P/F Christian í Grótinum fyri 1997, átti og rak konsernin táverandi m/s Christian í Grótinum og átti partabrøvini í P/F Palli, sum átti og rak m/s Palli hjá Mariannu, sum síðani eisini er seldur.

– Ársúrslitið fyri 1997 sambært roknskapinum varð eitt undirskot uppá kr. 776.000,-. Felagið hevði í 1997 eina samlaða skuld uppá kr. 52.563.000,- meðan eginpeningurin varð 21.656.000,-, ið svarar til 41,2 %, verður upplýst í svarinum hjá fiskimálaráðharranum til fyrra part av fyrispurninginum hjá Torbjørni Jacobsen.

Tørvurin á KT-fólki størsti trupuleikin

Tað almenna eigur, eins og vinnan, í nógv størri mun at gera KT til eitt menningarøki, skrivar Vinnuhúsið í tíðindaskrivi

Stórir møguleikar liggja í, at nýggja tøknin burturbeinir trupuleikarnar sum standast av okkara støðu sum eitt fjarskoti samfelag. Og hesar møguleikar eiga Føroyar at gagnnýta.

Tað almenna eigur, eins og vinnan, í nógv størri mun at gera KT til eitt menningarøki. Innan vinnuna er tørvurin á KT-starvsfólki størsti trupuleikin. Teldustøðinga útbúgvingin á Handilsskúlanum er eitt framstig, men verulig menning innan KT-vinnu kemur neyvan uttan hægri útbúgvingar.

Útbúgvingarætlanir

Ætlanir eru frammi um eina útbúgving á Bachelor-støði á Fróðskaparsetrinum. Hetta merkir at fólk fara uttanlands at lesa víðari. Arbeiðsgevarafelagið er av teirri áskoðan at vit heldur áttu at lagt okkum upp at einari líknandi loysn sum nýggja KT-universitetið í Keypmannahavn, soleiðis at endalesturin á master-støði, lá í Føroyum.

Harvið gjørdu tey lesandi sína útbúgving lidna í Føroyum, og vit fingu betri umstøður at menna gransking innan KT. Føroya Tele átti at verið privatisera, og tøki kapitalurin átti at veri oyramerktur til menning av KT- og telesamskifti.

Nýggir pengaseðlar um at verða klárir

Seinni í summar fer Fíggjarmálastýrið at almannakunngera motivini á nýggju føroysku pengaseðlunum, sum koma í gildi næsta ár

JOHN JOHANNESSEN

Næsta ár skulu føroyingar hava nýggjar pengaseðlar. Orsøkin er, at verandi pengaseðlar ikki eru nóg tryggir. Teir eru ov lættir at falsa.

Nýggju pengaseðalarnir skulu hava vatnmerki og ávís magnetbond, ið gera, at bankarnir beinan vegin kunnu staðfesta, um ein pengaseðil er falskur, tá hann kemur inn í bankan. Hetta skal gerast við serligum tólum, ið lýsa seðilin fígjognum og staðfesta, um hann er veruligur.

Í Danmark er tjóðarbankin um at vera liðugur at skifta donsku seðlarnir út, og tá hetta arbeiði er heilt liðugt verður farið undir arbeiðið at skifta út føroysku seðlarnar.

Motivini verða skift út á øllum seðlunum, men enn er ikki heilt greitt, hvørji motivini verða á nýggju seðlunum. Tó vórðu nøkur av motivunum víst fram á landsstýrisfundi gjáramorgunin, har kunnað varð um nýggju seðlarnar, og seinni í summar skal endaliga vera avgjørt, hvørji motivini verða, og tá verða tey eisini almannakunngjørd.

Løgreglan havt lítið at gjørt

Góða veðrið um vikuskiftið hevur ikki havt størri arbeiðsbyrðu til løgregluna við sær. Stak friðarligt hevur verið, verður sagt av støðini í Havn

SVEINUR TRÓNDARSON

Veðrið hevur verið so vælsignað um vikuskiftið og tað plagar at hava við sær, at nógv fólk er í býnum. Og tá so er, plagar løgreglan eisini at hava sítt at síggja til. Soleiðis var kortini ikki um vikuskiftið.

Av støðini í Havn verður sagt, at tað hevur verið serstakliga friðarligt í býnum um vikuskiftið.

- Lagið hevur verið gott og fólk hava hugnað sær. Onkur hevði fingið ov nógv innanborðað, og tí hava vit havt sjey liggandi gestir um vikuskiftið. Men tað er so at siga tað einasta, sigur vakthavandi á støðini í Havn.

Úr Suðuroynni eru boðini tey somu. – Telefonin hevur ikki ringt um vikuskiftið, so vit hava bara koyrt runt ymsastaðni í oynni, sigur vakthavandi á Tvøroyri.

Heldur ikki í Vágum hendi stórvegis. Tvey smærri ferðsluóhapp vóru í Sandavági, eitt leygardagin og eitt sunnudagin, men annars kundi løgreglan har brúka orkuna upp á ferðafólkini, sum komu um vikuskiftið.

Falskur alarmur í Tinganesi

Fríggjakvøldið fór alarmurin á Brandstøðini í gongd. Eftir elektronisku fráboðanini at døma brann í Tinganesi, men soleiðis var tíbetur ikki. Talan var um tekniskt brek

SVEINUR TRÓNDARSON

Í hesum tøknitíðum, hava nógv arbeiðspláss fingið sær elektroniska eldávaringarskipan. Í mongum føri hava tær beinleiðis samband við Brandstøðina í Havn, og hendir eitthvørt, fer ávaringarskipanin hjá støðini í gongd.

Tinganes er eitt teirra, sum hevur fingið sær slíka skipan, og um vikuskiftið fór ávaringarskipanin á Brandstøðini í gongd. Eldur var í niðri í Tinganesi, og so ráddi um at koma oman, og tað skjótt. Men tíbetur var talan um falskan alarm í hesum føri, greiðir vakthavandi á løgreglustøðini í Havn frá.

– Bæði sløkkiliðið og vit fóru oman, men tað vísti seg at vera eitt brek í ávaringarskipanini – tíbetur, greiðir vakthavandi frá. Tí kundu báðir partar fara aftur til húsa við ró í sinni.